# SEV má endavendast

**Broytingar mugu gerast í SEV fyri at tryggja, at vit ikki aftur koma í eina støðu sum hesa, sigur Kim Durhuus, sum er valdur til stýrisformann**

SEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Støðan, sum SEV er í nú, er prógv um, at felagsskapurin má endurskoðast, tí hetta má ikki henda aftur, sigur KimDurhuus, sum nú er valdur til stýrisformann í SEV*

– Hetta kann ikki halda fram.

Kim Durhuus, sum nú er valdur til nýggjan stýrisformann í SEV, sigur, at fløjkan, sum nú er í elfelagnum, er eitt prógv um, at tað viðurskiftini í SEV mugu takast upp til viðgerðar av nýggjum.

Hann hugsar serliga um reglugerðina fyri felagsskapin.

– Reglugerðin hjá SEV er nýggj, men støðan, sum vit hava verið í seinastu dagarnar, vísir, hvussu umráðandi tað er hon verður tikin upp til viðgerðar av nýggjum. Sostatt er tað neyðugt at endurskoða reglugerðina og at nágreina ymisk viðurskifti í henni.

Tað, sum er hent hesar seinastu dagarnar, er, at stýrið hevur skipað seg av nýggjum og at stjórin hevur fingið ætlanarskriv um uppsøgn.

Men minnilutin í stýrinum góðtekur ikki hesa avgerð og hevur tí skotið hana inn fyri umboðsráðið.

–Tað er rætt, at minnilutin hevur møguleikan at skjóta avgerðir inn fyri umboðsráðið. Men tað er anlt annað enn vist um minnilutin hevur heimild at skjóta eina avgerð sum hesa inn fyri umboðsráðið.

Kim Durhuus sigur, at tá ið minnilutin fekk hesa heimildina at skjóta avgerðir inn fyri umboðsráðið, var tað ikki meiningin, at allar avgerðir skuldi kunna skjótast inn fyri umboðsráðið.

– Tað var ikki ætlanin, at vanligar avgerðir, sum mugu sigast at hoyra undir daglidagin, skuldi kunna skjótast inn fyri umboðsráðið.

Hann sigur, at ætlanin við hesi heimildini var, at tók ósemja seg upp um stórar avgerðir, sum bundu SEV fíggjarliga, skuldi minnilutin hava ta verju, at hann kundi sjóta avgerðina inn fyri umboðsráðið.

Tað var ikki ætlanin at umboðsráðið skuldi órógvast við einum máli um at skipa stýrið.

Tí er tað í hansara hugaheimi als ongin ivi um, at tað er hann, sum er stýrisformaður í SEV, tí tað stendur í reglugerðini, at stýrið skipar seg sjálvt.

Tað stendur eisini, at tað er stýrið, sum setir stjóran og sum loysir hann úr starvi.

Tað er løgfrøðingurin hjá teimum samdur í.

Aðrir løgfrøðingar halda hinvegin, at tá ið málið verður skotið inn fyri umboðsráðið, koma ongar broytingar at henda, fyrrenn umboðsráðið hevur talað.

– Bara tað, at løgfrøðingar eru ósamdir um eitt mál, sum hetta, er prógv um, at tað er neyðugt at endurskoðað reglugerðina og at gera hana greiðari, so at vit ikki einferð afturat enda í eini støðu, sum hesari, sigur Kim Durhuus.

– Hetta er eitt mál, sum umboðsnevndi má taka upp í næstum. Í hesum sambandi má gerast greitt, hvørjar avgerðir i stýrinum, kunnu kærast fyri umboðsnevndini og hvørjar kunnu ikki.

Samstundis hevur Landsstýrið boðað frá eini nýggjari elveitingarlóg og eisini í tí sambandinum er neyðugt at endurskoð SEV.

Akkurat hvar tað skal bera í sær, veit hann ikki enn, men SEV má lagast til lógarverkið og so veldst um, hvussu broytingarnar verða.

Hann vil kortini ikki siga nakað um orsøkina til, at meirilutin í stýrinum vil hava stjóran frá.

– Hann hevur nú fingið eitt ætlanarskriv og tað eigur at ganga sína gongd í friði og náðum, sigur Kim Durhuus.

# Rundferðin byrjaði í Suðuroy

**Nú er arbeiðið byrjað at skráseta øll almenn støð í Føroyum fyri at vita, hvussu atkomulig tey eru hjá brekaðum**

ATKOMA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin byrjaði arbeiðið hjá Meginfelag Teirra Brekaðu í Føroyum, MBF, at skráseta øll almenn og og hálvalmenn støð í Føroyum.

Endamálið er at vita, hvussu atkomulig tey eru hjá brekaðum.

Tað er Leila Solmunde, forkvinna í MBF, sum sjálv ferðast landið runt at kanna tey ymsu støðini.

Skrásetingin byrjaði í Suðuroy leygardagin og hildið verður fram í Føroya syðstu oyggj alla vikuna.

Síðani verður farið runt landið, til alt landið er kannað.

Talan er um kirkjur, samkomuhús, bygdarhús, ítróttarhallir, posthús, bankar, skúlar kommunuskrivstovur og slík, støð, sum verða kannað.

Hugt verður bæði eftir, hvussu atkomulig støðini eru hjá brekaðum. Men kannað verður eisini eftir, hvussu umstøðurnar hjá blindum og deyvum eru, eitt nú við teleslyngum o.s.fr.

Allir hesir upplýsingar skulu síðani skrásetast í eini handbók, so at brekað altíð kunnu vita, hvussu umstøðurnar eru í teimum ymsum bygdunum og býunum kring landið.

### Kann brúkast av báðum pørtum

Leila Solmunde leggur dent á, at talan er ikki um eina atfinning ímóti kommunum ella øðrum myndugleikum.

– Endamálið er at lýsa støðuna sum hin er og at geva brekaðum eina handbók, so tey vita, hvussu umstøðurnar eru kring landið.

Men hetta kann eisini verða eitt hent amboð hjá kommunum, landsmyndugleikum, ítróttarfeløgum og felagsskapum av ymsum slagi.

– Taka tey eisini hesa handbókina til sín og brúka hana sum eina vegleiðing í eini roynd at bøta um umstøðurnar, hevði nógv verið vunnið, sigur leila Solmunde.

Eftir tí, hon higartil hevur sæð í Suðuroy, er støðan tann sama her, sum aðrastaðni í landinum.

Og tað merkir, at tað eru nógv støð, har tað ikki er atkomandi hjá brekaðum.

Forkvinnan í MBF sigur, at tað fer at kosta einar 100.000 krónur at gera handbókina.

Í hesum sambandi hava tey søkt kommunurnar um at stuðla tiltakinum.

Lata allar kommunur sín part, er talan um góðar tvær krónur fyri hvørt fólki.

Hetta hevur Hvalbiar bygdaráð roknað út. Tað viðgjørdi umsóknina fyrr í vikuni og gjørdi av at játta 2000 krónur, sum er parturin hjá Hvalbiar Kommunu eftir fólkatalinum og so er nakað lagt afturat fyri at fáa eitt runt tal.



*Hertil og ikki longur. Tá ið Leila Solmunde leygardagin fór undir arbeiðið at skráseta øll almenn støð í Føroyum, byrjaði hon í Sandvík. Og hon mátti beinanvegin ásanna, at í Kirkju hevði hon ikki kunnað farið. Her situr hon við kirkjutrappurnar og sleppur ikki longur*